# Nógvir um boðið

**Henrik Larsen fegnast um, at tað í løtuni tykjast vera so nógvir leikarar, sum banka alsamt harðari á landsliðsdyrnar**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*



*Landsliðsvenjarin roknar við, at skotar fara at leggja nógv fyri fyrstu løtuna á Hampden Park*

**Glasgow:** Sum kunnugt, so var tað ímóti Skotlandi, at Henrik Larsen og føroyska landsliðið fóru undir inniverandi undankapping. Tað ferðina gekk tað sum so heilt væl, og hesaferð tykist Henrik Larsen eisini hava góðar vónir um, at tað fer at bera til hjá okkara at stríða seg til eitt gott úrslit.

– Tað er nokk einki at ivast í, at teir frá fyrta bríksli royna at leggja trýst á. Teir eru á heimavølli framman fyri sínum egnu áskoðarum, og ein javnleik fáa teir ikki brúkt til nakað sum helst. Men megna vit at fáa okkara spæl at koyra, soleiðis at vit halda teimum fyrstu løtuna, so kann jú nógv henda. Ikki minst um teirra áskoðarir so eisini vísa sína ónøgd.

*Á Svangaskarði í fjør var tað serliga í síðunum, at tað gekst væl hjá okkum. Roknar tú við, at vit fáa eins gott pláss hesaferð?*

– Nú mugu vit jú síggja, hvussu teir stilla upp, men vit mugu so gera okkara part.

## Fleiri trýsta á

Enn hevur landsliðsvenjarin ikki gjørt av, hvørjar ellivu hann skal senda í eldin frá fyrsta bríksli. Men í mun til seinasta dystin, so hevur hann aftur Jákup á Borg og Fróða Benjaminsen at taka av, og at teir báðir byrja inni, tykist eingin ivi vera um.

– Tað er jú soleiðis í slíkum kappingum, at tá seinasti dystirnir skulu spælast, er næstan altíð onkur, sum er leikbannaður. Hesa ferð er tað so Christian Høgni, men tað er einki at ivast í, at tað er ein styrkur, at vit nú hava Jákup og Fróða aftur. Ta tíðina, sum eg havi havt landsliðið, hava teir í øllum førum verið millum teir, sum hava tikið størstu tøkini. Og teir tykjast eisini vera væl fyri í løtuni, so tað er einki at ivast í, at kappingin um plássini er økt.

– Hartil er eisini at fegnast um, at tað nú eru alt fleiri leikarar, sum banka alsamt harðari upp á landsliðsdyrnar. Jann Ingi hevur gjørt tað sera gott, tá hann hevur fingið møguleikan, og Tór-Ingar hevur gjørt nógv um seg í venjingunum, so vit fáa at síggja. Enn er ein venjing eftir, og tað verður so ikki fyrr enn eftir hana, at vit endaliga finna útav, hvussu liðið sær út. Men tað sær gott út í løtuni, segði Henrik Larsen at enda.

# Follin væl til

**Nýggi landsliðsleikarin úr Lyngby tykist fegin um, hvussu lætt tað hevur verið at blivið partur av landsliðshópinum**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*



*Christian Lamhauge Holst sigur seg als ikki hava hóming av, um ella í hvønn mun hann verður partur av dystinum leygardagin*

**Glasgow:** Longu áðrenn hann yvir høvur hevði sæð nýggju liðfelagar sínar, hevði føroyski almenningurin í øllum førum fingið eitt at vita, hvør Christian Lamhauge Holst var. Leikarin úr Lyngby, sum eingin hevði hoyrt um. Í øllum førum ikki fyrr enn týsdagin í seinastu viku.

Mikudagin slapp hann so fyri fyrstu ferð at hitta restina av landsliðshópinum, og tá vit hittu hann eftir seinnapartsvenjingina hósdagin, tóktist leikarin sjálvur at lata væl at nýggju tilveruni.

– Tað fyrsta, sum eg beit merki í, var at hetta er gott kollektiv. Tað er ikki nakað fastlæst hierarki, soleiðis at tú sært nakrar seta seg oman yvir hinar á liðnum, og tað hevur í øllum førum gjørt tað munandi lættari hjá mær at koma inn sum nýggjur maður.

Tá tosið so fellur inn á dystin leygardagin, og teir tankar, sum Christian hevur gjørt sær um hendan, so tykist tað í øllum førum ikki vera so, at hann ætlar sær at krevja nakað pláss á liðnum.

– Sjálvandi vóni eg, at eg sleppi at fáa nakrar minuttir á vøllinum. Tað skal eg jú gera. Men hinvegin havi eg sum so ikki nakra ímynd av, hvussu leingi eg skal bíða eftir møguleikanum. Tað má eg bara taka, soleiðis sum tað kemur.

Men tað skerst ikki burtur, at talan er um eitt sindur øðrvísi umstøður á Hampden Park í mun til eitt nú Lyngby Stadion. Er tað ikki nakað, sum tú hevur gjørt tær nakrar tankar um, soleiðis at tú eisini sálarliga er klárur til dystin.

– Nú eri eg ikki tann, sum soleiðis hugsi um, hvussu eg skal fyrireika meg til dystin. Men tað er nokk einki at ivast í, at um tú skalt inn til ein slíkan dyst, so mást tú savna tankarnir fyrst. Har verður jú ein rúgva av áskoðarum, sum helst fara at gera sítt til, at dysturin ikki skal verða lættur hjá okkum.

Men tað er í øllum førum ein máti, sum tit kunnu fáa hesi at tagna uppá?

– Ja. Við at skjóta mál. Tað er so í øllum førum tað, sum mann droymir um, men nú fáa vit so at síggja, hvussu gongur við tí, segði altso nýggi landsliðsleikarin at enda.

## Skotarnir ræðast John

**Ikki heilt óvæntað var tað John Petersen, sum flestu tíðindafólkini vildu hava orðið á, tá føroyska liðið kom til Skotland**



*Eg svaraði bara aftur, at teir skuldu óttast. Ikki bara meg, men øllum liðnum, segði John Petersen um virðingina, sum skotar tykjast hava fyri honum*

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Glasgow:** Einki er at ivast í, hvør leikarin er, sum skotar hava mest virðing fyri. Við teimum báðum føroysku málunum í javnleikinum móti Skotlandi á Svangaskarði var John Petersen maðurin, sum tók alt Skotland á bóli. Og at minnið um hetta framvegis er sjónligt, var sjón fyri søgn, tá føroyska liðið mikukvølidð lendi í Glasgow.

– Jú, har vóru heilt nógv tíðindafólk, sum vildu hava at vita, hvørt eg ætlaði at endurtaka hetta. Onkur tók enntá til, at eg var maðurin, sum skotar óttast, men eg svaraði bara aftur, at teir skuldu óttast. Ikki bara meg, men øllum liðnum, tí vit ætlaðu at fáa okkurt við okkum, segði John Petersen flennandi, tá vit hósdagin fingu orðið á hann.

Og tað er einki at ivast í, at vónirnar eru góðar hjá John.

– Skotarnir eru í øllum førum kroystir. Eg vil ikki siga, at teir ræðast okkum, men teir bera í øllum førum ótta fyri, at úrslitið ikki verður nóg gott. Teir minnast jú dystin á Svangaskarði, og hesa ferð eru teir kroystir at vinna. Gera teir ikki tað, so eru teir úti av kappingini. Tað kann geva okkum ein fyrimun, men nú fáa vit at síggja, segði ein máltystur John Petersen at enda.



# Óli hevur verið við hvørja ferð

**Skotland er saman við Kekkia og Jugoslavia – bæði í fleiri útgávum – fótbóltstjóðirnar, sum Føroyar hava dystast ofta við í undankappingum**

SKOTLAND–FØROYAR
*Jóannes Hansen*

Skotland er ein av fótbóltstjóðunum, sum Føroyar hava spælt flest landsdystir ímóti. Ímóti ongum øðrum hava Føroyar spælt so ofta ímóti sum Íslandi. Undan altjóða limaskapinum í 1988 vóru nógvir landsdystir ímóti grannunum fyri vestan – bæði B og A landsliðnum. Samlaða dystartalið er nú 26. Síðani føroyski FIFA limaskapurin gjørdist veruleiki í 1988, hava Ísland og Føroyar spælt átta landsdystir. Allir uttan tveir hava verið vinardystir. Báðir dystirnir í ár vóru EM undankappingardystir.

Tá ið tað kemur til undankappingardystir hava Føroyar spælt flestu ferðirnar ímóti trimum tjóðum: Jugoslavia, Kekkia og Skotlandi. Tvey tey fyrru londini hava verið fyri nógvum broytingum, meðan fótbóltssamskiftið hevur verið við Føroyar. Gamla Jugoslavia datt sundur eftir tveir teir fyrstu dystirnar ímóti Føroyum, og tá ið Føroyar spældu teir fyrstu av undankappingardystunum ímóti Kekkia, vóru teir í felagsskapi við Slovakia.

Skotland líkist framvegis sær sjálvum. Tað gjørdi tað eisini, tá ið Føroyar 12. oktober í 1994 spældu fyrsta landsdystin ímóti teimum í Glasgow. Skotand vann 5–1. Seinnapartin í dag fara Føroyar og Skotland at spæla sætta landsdystin.

Hjá føroyska liðnum hevur úrslitaliga gingið rætta vegin ímóti Skotlandi. Eftir 5–1 tapið í 1994, vann Skotland í 1995 2–0 í Føroyum, og í 1998 vann Skotland 2–1 í Aberdeen. Tvær tær síðstu ferðirnar hevur verið javnleikur á Svangaskarði: 1–1 í 1999 og 2–2 í fjør.

Føroyar eiga framvegis fyrsta sigurin á Skotlandi til góða.

## Drúgvu menninir

Óli Johannesen er tann av føroysku landsliðsspælarunum, sum oftast hevur umboðað føðilandið. Tí kemur tað neyvan óvart á, at Óli er tann føroyingurin, sum oftast hevur tikist við skotar. Hann hevur verið við allar fimm ferðirnar, og hann hevur spælt allar dystirnar á tamb.

Undan dystinum ímóti Íslandi, lótu venjararnir skína ígjøgnum, at eitt av ivamálunum var, um Óli Johannesen skuldi vera í miðverjuni, ella um Hans Fróði Hansen skuldi fáa møguleikan. Óli Johannesen varð valdur, og ta ferðina var hann fyri 62. ferðina á landsliðnum.

Tríggir spælarar hava verið við fýra ferðir ímóti Skotlandi. Teir eru Todi Jónsson, Jens Kristian Hansen og Julian Johnsson. Av hesum hevur bara Julian Johnsson í kvøld møguleikan at spæla fyri fimtu ferð ímóti Skotlandi. Merkisvert er tað, at Julian hevur umboðað fýra feløg í landsdystum ímóti Skotlandi. Í heimadystinum í 1995 umboðaði hann HB, í 1998 og í 1999 umboðaði hann Kongsvinger, í fjør umboðaði hann B36, og hesa ferð umboðar Julian ÍA Akranes á landsliðnum.

Jens Martin Knudsen hevur vart málið tríggjar ferðir ímóti Skotlandi. Í kvøld ferð Jákup Mikkelsen eftir øllum sólarmerkjum at døma – í býnum har hann dagliga arbeiðir í Partick Thistle – fyri triðju ferð at verja landsliðsmálið ímóti Skotlandi.

Frá tí fyrsta dystinum í 1994 og til tann næsta í 1995 líktust liðini heilt nógv. Síðani gingu tað trý ár inntil Føroyar og Skotland aftur hittust. Tá var talan um nýggja EM undankapping, og tí sigur tað seg sjálvt, at skiftingarnar høvdu verið nógv fleiri. Á átjan manna liðnum, sum í hesi vikuni er í Glasgow, eru tað bara málverjarnir báðir, Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen, sum eisini vóru á liðnum fyri níggju árum síðani. Tólv av teimum átjan, sum vóru við í 2–2 dystinum á Svangaskarði í fjør, eru við í Skotlandi,og av teimum fyrstu ellivu í fjør eru tríggir ikki við hesa ferð – Jens Kristian Hansen, Hjalgrím Elttør og Christian Høgni Jacobsen.

**28. Skotland–Føroyar 5–1 (3–0)**
**10. EC**
**Í Glasgow mikudagin 12. oktober 1994**
**19.867 áskoðarar**
1–0: John McGinlay 5.
2–0: Scott Booth 34.
3–0: John Collins 41.
4–0: Billy McKinlay 61.
5–0: John Collins 73.
5–1: Jan Allan Müller 75.
**Skotland:** Andy Goram, Glasgow Rangers – Stewart McKimmie Aberdeen, Colin Hendry Blackburn Rovers (Billy McKinlay, Dundee United, 59.), Alan McLaren, Glasgow Rangers, Craig Levein, Hearts Edinburgh, Tommy Boyd, Celtic Glasgow, Pat Nevin, Tranmere Rovers, John Collins, Celtic Glasgow, Paul McStay, Celtic Glasgow, Scott Booth, Aberdeen (Andy Walker, Celtic Glasgow, 71.), John McGinlay, Bolton
**Venjari:** Craig Brown
**Føroyar:** Jens Martin Knudsen, GÍ – Henning Jarnskor, GÍ, Tummas Eli Hansen, B36, Óli Johannesen, TB, Jens Kristian Hansen, Randers Freja, Øssur Hansen, Vejle – Jan C. Dam, HB (Djóni N. Joensen, NSÍ, 54.), Kurt Mørkøre, KÍ (Janus Rasmussen, GÍ, 71.), Magni Jarnskor, liðformaður, GÍ – Jan Allan Müller, Horsens, Todi Jónsson, Lyngby BK
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** Jákup Mikkelsen, Herfølge, Jan Andreasen, KÍ, Jens Erik Rasmussen, Horsens
**Venjari:** Allan Simonsen

**33. Føroyar–Skotland 0–2 (0–2)**
**15. EC**
**Á Svangaskarði mikudagin 7. juni 1995**
0–1: Billy McKinlay 25.
0–2: John McGinlay 29.
**Føroyar:** Jens Martin Knudsen, GÍ – Henning Jarnskor, GÍ, Tummas Eli Hansen, B36, Óli Johannesen, TB, Janus Rasmussen, GÍ, Øssur Hansen, B68 – Julian Johnsson, HB, Jens Kristian Hansen, B36, Magni Jarnskor, liðformaður, GÍ (Allan Joensen, KÍ, 56.) – Jens Erik Rasmussen, Horsens (Jan Allan Müller, Horsens, 74.), Todi Jónsson, Lyngby BK
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: Kaj Leo Johannesen, HB, Harley Bertholdsen, KÍ, Djóni N. Joensen, NSÍ
**Venjari:** Allan Simonsen
**Skotland:** Jim Leighton, Hibernian Edinburgh – Craig Burley, Chelsea, Colin Calderwood, Totthenham Hotspur, Stewart McKimmie, Aberdeen, Alan McLaren, Glasgow Rangers, Rob McKinnon, FC Motherwell – Darren Jackson, Hibernian Edinburgh, John Collins, Celtic Glasgow, Billy McKinlay, Dundee United, John McGinlay, Bolton Wanderers (Scott Gemmil, Nothingham Forest, 76.), Duncan Shearer, Aberdeen (John Robertson, Hearts Edinburgh, 71.)
**Venjari:** Craig Brown

**56. Skotland–Føroyar 2–1 (2–0)**
**23. EC**
**í Aberdeen mikudagin 14. oktober 1998**
**18.517 áskoðarar**
1–0: Craig Burley 22.
2–0: Billy Dodds 45.
2–1: John Petersen br 86.
**Skotland:** 1. Neil Sullivan, Wimbledon – David Weir, Heart of Midlothian, Colin Hendry, Glasgow Rangers, Matt Elliot Leicester City, Tom Boyd, Celtic Glasgow – Billy McKinlay, Blackburn Rovers (Ian Durrant, Kilmarnock, 46.), Craig Burley, Celtic Glasgow, Callum Davidson, Blackburn Rovers – Allan Johnston, Sunderland (Stephen Glass, Newcastle United, 80.), Billy Dodds, Dundee United, Simon Donnelly, Celtic Rangers
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** Jonathan Gould, Celtic Rangers, Colin Calderwood, Tottenham Hotspur, Darren Jackson, Celtic Glasgow, Ally McCoist, Kilmarnock, Derek Whyte, Aberdeen
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen, Herfølge – Hans Fróði Hansen, HB, Óli Johannesen, TB, Jens Kristian Hansen, liðformaður, B36 – Pól Thorsteinsson, B36, Sámal Joensen, GÍ, John Petersen, B36, Julian Johnsson, Kongsvinger, Henning Jarnskor, GÍ (John Hansen, KÍ, 81.) – Uni Arge, Aarhus Fremad (Jákup á Borg, B36, 69.), Todi Jónsson, FCK
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** Jens Martin Knudsen, Jan Joensen, KÍ, Jan C. Dam, HB, Jóhannis Joensen, HB, Símun Eliasen, Aarhus Fremad
**Venjari:** Allan Simonsen

**58. Føroyar–Skotland 1–1 (0–1)**
**24. EC**
**á Svangaskarði leygardagin 5. juni 1999**
**4.100 áskoðarar**
0–1: Allan Johnston 39.
1–1: Hans Fróði Hansen 90.
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen, Herfølge – Hans Fróði Hansen, HB, Óli Johannesen, TB, Pól Thorsteinsson, B36 – Jóhannis Joensen, HB (Jákup á Borg, B36, 70.), Allan Mørkøre, HB, Julian Johnsson, Kongsvinger, Sámal Joensen, GÍ, Øssur Hansen, B36 (John Ryan, KÍ, 85.) – John Petersen, B36 (Uni Arge, Leiftur, 82.), Todi Jónsson, liðformaður, FCK
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** Jens Martin Knudsen, Leiftur, Jens Kristian Hansen, B36, Jan C. Dam, HB og Fróði Benjaminsen, B68
**Venjari:** Allan Simonsen
**Skotland:** Neil Sullivan, Wimbledon – Matt Elliot, Leicester City, Tom Boyd, liðformaður, Celtic Glasgow, Colin Calderwood, Aston Villa, Callum Davidson, Blackburn Rovers – David Weir, Everton, Poul Lambert, Celtic Glasgow, Ian Durrant, Kilmarnock (Colin Cameron, Heart of Midlothian, 46.) – Allan Johnston, Sunderland (Scott Gemmill, Everton, 85.), Billy Dodds, Dundee United, Kevin Gallacher, Blackburn Rovers (Eoin Jess, Aberdeen, 89.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** Jonathan Gould, Celtic Glasgow, Derek Whyte, Aberdeen, Paul Ritchie, Heart of Midlothian, Robbie Winters, Aberdeen
**Reytt kort:** Matt Elliott 45.
**Venjari:** Craig Brown

**82. Føroyar–Skotland 2–2 (2–0)**
**29. EC**
**EM–2004 undankapping Leygardagin 7. september 2002, kl. 15.00 á Svangaskarði 4.200 áskoðarar**
1–0: John PETERSEN 6.
2–0: John PETERSEN 13.
2–1: Poul LAMBERT 61.
2–2: Berry FERGUSON 85.
**Føroyar:** 1. Jens Martin KNUDSEN, 56/-143, NSÍ – 4. Pól THORSTEINSSON, 23/0, NSÍ, 2. Óli JOHANNESEN, 57/1, liðformaður, TB, 5. Jón Rói JACOBSEN, 6/0, HB, 3. Jens Kristian HANSEN, 42/3, B36 – 9. Jákup Á BORG, 22/0, B36, 7. Fróði BENJAMINSEN, 16/1, B68, 8. Julian JOHNSSON, 45/2, B36, 6. Hjalgrím ELTTØR, 3/0, KÍ (13. Heðin Á LAKJUNI, 9/0, KÍ, 90.) – 10. John PETERSEN, 41/5, B36 (17. Andrew AV FLØTUM, 5/0, HB, 79.), 11. Christian Høgni JACOBSEN, 12/2, Vejle (12. Rógvi JACOBSEN, 17/1, HB, 74.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 14. Hans Fróði HANSEN, 23/1, B68, 15. Jóhannis JOENSEN, 12/0, HB, 16. Jákup MIKKELSEN, 26/-48, Molde, 18. Sjúrður JACOBSEN, 1/0, NSÍ
**Gult kort:** Jákup Á BORG 18., Jens Martin KNUDSEN 77.
**Venjari:** Henrik LARSEN
**Skotland:** 1. Robert DOUGLAS, 5/2, Celtic – 2. Maurice ROSS, 5/0, Rangers (17. Graham ALEXANDER, 6/0, Preston, 73.), 5. David WEIR, 37/1, Everton, 4. Christian DAILLY, 37/3, West Ham, 3. Stephen CRAINEY, 4/0, Celtic – 7. Poul DICKOV, 4/0, Leicester (13. Stephen CRAWFORD, 4/1, Dunfermline, 46.), 6. Barry FERGUSON, 12/2, Rangers, 10. Poul LAMBERT, 32/1, liðformaður, Celtic, 8. Scott DOBIE, 5/1, West Bromwich (14. Steven THOMPSON, 5/1, Dundee, 84.) – 9. Kevin KYLE, 5/1 Sunderland, 11. Allan JOHNSSTON, 18/2, Middlesbrough
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Poul GALLACHER, 1/0, Dundee, 15. Kevin MCNAUGHTON, Aberdeen, 16. Lee WILKE, Dundee, 3/0, Gareth WILLIAMS, 4/0, Nottingham Forrest
**Gult kort:** Maurice ROSS, 45., David WEIR 72., Steven THOMPSON, 87.
**Venjari:** Berti VOGTS